# So upprann tann stóri dagur…

**Stór móttøka var fyri KÍ í hølum felagsins týsdagin í sambandi við 100 ára dagin hjá felagnum. Nógvir gestir, nógvar røður, gávur og pinnamatur við onkrum at leska sær afturvið**

MÓTTØKA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Rættiliga nógv fólk vóru til móttøkuna hjá KÍ í sambandi við 100 ára dagin*

**Klaksvík:**
Klokkan var ikki farin langt av fýra, tá fólk byrjaði at savnast í snotuligu kaféini hjá Kí, sum var karmur um móttøkuna týsdagin.

Ung sum gomul, stuðlar og viðhaldsfólk, leikarar og fyrrverandi leikarar – øll vóru savnað til at heiðra KÍ hendan stóra og runda dag. Nógv bóru fram heilsu til felagið, og Barometrið var somuleiðis á vitjan.

Fyrstur at halda røðu var formaður felagsins, Gestur Hovgaard, sum bjóðaði øllum vælkomnum. Hann tosaði um, at tað ikki var so stórur føðingardagshýrur, tá hann var uppi týsmorgunin, men so hvørt sum tað leið út á dagin, og alsamt fleiri og fleiri ringdu og bóru fram heilsu, byrjaði tað nærum at kennast, sum tað var eg sjálvur, sum hevði føðingardag, segði Gestur millum annað.

Umboð fyri FSF, Statoil, Føroya Banka, Norðoya Sparikassa og Klaksvíkar kommunu bóru eisini fram heilsu til føðingardagsbarnið.

Hans Waag, stjóri í Statoil, sum er høvuðsstuðul hjá KÍ, tosaði um tað ótrúliga samanhaldið millum norðoyingar um KÍ.

– Tað plagar at síggjast best, tá KÍ spælir landskappingardyst í Gundadali. Tað er dagur í viku hjá kassameistarunum í havnarfeløgunum, tók hann skemtandi til.

Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa, tosaði um, at eitt var felags fyri stovnanina av bæði sparikassanum og KÍ.

– Fólk sóu, at um nakað skal henda í Klaksvík, so mugu vit sjálvi gera tað, segði Eyðfinn Reyðberg millum annað.

Borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen, handaði Gesti Hovgaard ein kekk áljóðandi 100.000 krónur frá kommununi. Felagið fekk eisini aðrar gávur handaðar umframt at ein ørgrynna av blómutyssum vórðu send felagnum í sambandi við stóra dagin.

Móttøkan skuldi vara frá klokkan 16 til 20, og sum sagt vóru heilt nógv fólk tilstaðar.

Men hóast tað skuldi venjast, og klokkan hálvgum seks bar dagligi leiðarin, Bill Jacobsen, fram eina heilsu frá venjaranum, Ove Flindt Bjerg, at hetta ikki var eitt sosialt felag og at unglingar, 1. og 2. deild skulu møta til venjing á vøllinum klokkan seks.

Stóra føðingardagsveitslan hjá KÍ verður annars hildin einaferð í november mánaði.



*100.000 krónur fekk felagið í gávu frá Klaksvíkar kommunu*



*Tveir fyrrverandi KÍ leikarar hittast á 100 ára degnum. Málverjin Steven Boyle og Heðin á Lakjuni, sum báðir vóru á liðnum, tá KÍ vann greipuna í 1999*



*Kí er ikki bara fótbóltur. Borghild úr Hvalvík gav Markusi Tummas eina mynd av kvinnuliðnum hjá Stjørnuni, sum vann meistarheitið í 1958*



*Sum vera man vóru nógv børn til móttøkuna. KÍ hevur eitt virkið og gott ungdómsarbeiði, og allarhelst munnu hesir verða framtíðar fyrstu deildar spælarar*




# Nú byrja vit aftur!



**Venjingartíðir hjá Ljósinum 2004/05**

| Lið | Dagur | Klokkan | Stað | Leiðari |
|---|---|---|---|---|
| Foreldur & børn | mikudag | 17.00-17.45 | Kommunuskúlin | Heidi, Hjørdis & Nena |
| Foreldur & børn | mikudag | 17.45-18.30 | Kommunuskúlin | Heidi, Hjørdis & Nena |
| 4 ár | mánadag | 17.00-18.00 | Nonnuskúlin | Ritva & Elsebeth |
| 5 ár | mikudag | 17.00-18.00 | Nonnuskúlin | Eirin & Rúna |
| 6 ár | týsdag | 16.00-17.00 | Nonnuskúlin | Gunnvá & Mary |
| 1. flokkur | hósdag | 16.00-17.00 | Nonnuskúlin | Bennvør & Heidi |
| 2. flokkur | hósdag | 18.00-19.00 | Nonnuskúlin | Julia & Rannvá |
| 3. flokkur | mánadag | 16.00-17.00 | Nonnuskúlin | Julianna & Jóna |
| 4. flokkur | mikudag | 16.00-17.00 | Nonnuskúlin | Krista & Ingibjørg |
| 5. flokkur | mikudag | 18.00-19.00 | Nonnuskúlin | Eirin og Rúna |
| 6. flokkur | týsdag | 19.00-20.00 | Nonnuskúlin | Súsanna & Poulina |
| 7.-9. flokkur | mánadag | 19.00-20.00 | Nonnuskúlin | Simona & Annika |
| 17-19 ár | mánadag | 20.00-21.00 | Nonnuskúlin | Durita |
| 20 ár | týsdag | 20.00-21.00 | Nonnuskúlin | |
| Motión | týsdag | 18.00-19.00 | Nonnuskúlin | Lydia |
| Motión | hósdag | 19.00-20.00 | Nonnuskúlin | Helle |
| Morgunfimleikur | hósdag | 9.15-10.00 | Háskúlin | Hjørdis |
| amboð ge./dr. 4-6 ár | týsdag | 17.00-18.00 | Kommunuskúlin | Randi & Ann |
| amboð ge. 1.-2. fl. | týsdag | 18.00-19.00 | Kommunuskúlin | Rannvá, Brim, Beinta, Elinborg, Sámal |
| amboð dr. 1.-3. fl | mánadag | 17.00-18.00 | Kommunuskúlin | Sámal & Hallfríð |
| amboð ge. 3.-4. fl. | mikudag | 19.00-20.00 | Kommunuskúlin | Barbara |
| amboð dr. 4.-6. fl. | mánadag | 18.00-19.00 | Kommunuskúlin | |
| amboð ge. 5.-6. fl. | hósdag | 17.00-18.00 | Kommunuskúlin | Rannvá & Jórun |
| amboð 7. fl. & eldri | hósdag | 18.00-19.00 | Kommunuskúlin | Rannvá & Jórun |
| amboð 7. fl. & eldri | hósdag | 19.00-20.00 | Kommunuskúlin | Rannvá & Jórun |
| pinkur stórkapping | týsdag | 17.00-18.00 | Nonnuskúlin | Hildigunn & Edith |
| pinkur stórkapping | hósdag | 17.00-18.00 | Nonnuskúlin | Hildigunn & Edith |
| smágentur stórkapping | mánadag | 18.00-19.30 | Eysturskúlin | Gunnvá & Asta |
| smágentur stórkapping | mikudag | 16.30-18.00 | Eysturskúlin | Gunnvá & Asta |
| gentur stórkapping | týsdag | 20.00-21.30 | Eysturskúlin | Jeanette & Ann |
| gentur stórkapping | hósdag | 16.00-18.00 | Eysturskúlin | Jeanette & Ann |
| kvinnur stórkapping | týsdag | 18.00-20.00 | Eysturskúlin | Arnóra & Ann |
| kvinnur stórkapping | hósdag | 18.00-20.00 | Eysturskúlin | Arnóra & Ann |
| úrval 1 - 2 | leygardag | 9.00-10.00 | Nonnuskúlin | |
| úrval 3 - 4 | leygardag | 11.00-13.00 | Nonnuskúlin | |
| HipHop 1 | mikudag | 19.00-20.00 | Nonnuskúlin | Billa & Belinda |
| HipHop 2 | mikudag | 19.00-20.00 | Nonnuskúlin | Billa & Belinda |
| Stórkappingar fimleikur | fríggjadag | 15.00-19.00 | Hoyvíkshøllin | |

## Fimleikafelagið Ljósið

**Kostnaður**

| | |
|---|---|
| Børn | 350,00 |
| Pensionistar | 350,00 |
| Amboð 1t. | 350,00 |
| 17 ár & eldir | 500,00 |
| Amboð 1½ t. | 450,00 |
| Foreldur & Børn | 500,00 |
| Motión | 500,00 |
| Avspenning | 400,00 |
| Dream Team | 750,00 |
| Kappingarlið | 400,00 |



- **Fyrivarni verður tikið fyri feilum/ broytingum í tímatalvuni**
- **Tilmelding til liðini verður í Sankta Frans skúla leygardagin 28. august kl. 14.00-17.00**
- **Íðkaratal á hvørjum liði er avmarkað!**
- **Gjaldast skal við tilmelding!**
- **Fimleikurin byrjar mánadagin 30. august**